FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY

15. juni 2008

Fiski- og Tilfeingismálaráðið
att.: Torbjørn Jacobsen
Heykavegur 6
FO-110 Tórshavn

**Tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni 15. juni 2008**

Við støði í §22 Stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap hevur Fiskirannsóknarstovan hesi tilmæli um fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2008/2009:

a) Fiskidagatalið hjá línuskipum, útróðarbátum við línu og snellu og lemmatrolarum við maskinorku undir 500 Hk (Bólkur 3, 4 og 5) verður minkað við 50%.
b) Fiskidagatalið hjá partrolarum (Bólkur 2) verður minkað við 20%.
c) Eingin serlig toska- og hýsukvota verður latin skipabólkum uttan um dagaskipanina. Ístaðin verður sett ein mest loyvd hjáveiða av toski og hýsu uppá 3% (í vekt fyri hvønn túr sær). Hetta eigur ikki at vera galdandi fyri fiskiskap á Føroya – Íslandsrygginum (t.d. norðan fyri 62$^{o}$39’N og vestan fyri 8$^{0}$00’V).
d) Eingin vinnuligur fiskiskapur verður loyvdur á Føroyabanka grynri enn 200 m.
e) Serligu gýtingarfriðingarnar fyri tosk á landgrunninum og upsa undir Føroyum halda fram.
f) Eingin vinnuligur fiskiskapur við húki eigur at verða loyvdur innan fyri 3 fjórðingar úr landi, og til toska- og hýsustovnurin eru komin fyri seg aftur, eigur heldur eingin vinnuligur fiskiskapur at verða loyvdur á leiðunum vístar í skjali 1.
g) Økini e og m verða stongd fyri trolfiskiskapi alt árið.
h) Meskavíddin í hjáveiðuposanum í trolingini á Landleiðini eigur at hækkast til 250 mm.
i) Bert skip og bátar, ið reka vinnuligan fiskiskap, sleppa at avreiða.

**Grundgevingar**

Ráðgevingin hjá Fiskirannsóknarstovuni tekur støði í stovnsmetingunum av botnfiski hjá Fiskirannsóknarstovuni/ICES í 2008 (Skjal 2) og í ráðgevingini hjá ICES í 2008 (Skjal 3). Ein samandráttur av hesum er í skjali 4.

Stovnarnir av toski á landgrunninum og á Føroyabanka eru søguliga illa fyri, hýsustovnurin í skjótari minking, meðan upsastovnurin hinvegin er hampuliga væl

PO-Box 3051 · Nóatún 1 · FO-110 Tórshavn · Føroyar
Tlf: (+298) 35 39 00 · Fax: (+298) 35 39 01 · E-mail: fishlab@frs.fo · www.frs.fo

fyri. Støðan er hættislig, og ICES mælir til onga veiðu eftir toski og hýsu í 2009, og at royndin eftir upsa í 2009 verður skerd við 20%.

Tað er eingin einfald loysn á trupulleikunum, og givið er, at skulu tiltøkini muna nakað, koma tey at merkjast víða í føroyskari fiskivinnu og samfelagnum annars. Landsstýrið eigur tí at umhugsa stig at linna avleiðingarnar, og at eggja til at royna nýggjar leiðir. Størsti einstaki trupulleikin í løtuni er, at húkaflotin er alt ov stórur, og stig eiga at verða tikin til at minka um hann.

Í §2 í lógini um vinnuligan fiskiskap verður m.a. sagt: "Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga". Skipanarnevndin sigur í frágreiðing frá 8. feb. 1996, at "stovnsrøktarendamálið er rokkið, um gýtingarstovnurin er oman fyri ávísa minstustødd, og veiðutrýstið síðani er so, at umleið ein triðingur av stovninum verður veiddur á hvørjum ári". Fiskirannsóknarstovan tekur undir við, at tað er avgerandi at halda gýtingarstovnunum oman fyri eina minstustødd, og at veiðutrýstið verður stillað so, at veiðan er burðardygg, og er hetta grundarsteinar í okkara ráðgeving.

Styrkin í eini dagaskipan er m.a., at um dagatal og aðrar reguleringar eru ásett rætt, so slepst undan á hvørjum ári at gera broytingar. Fiskirannsóknarstovan hevur tó, síðan dagaskipanin kom í gildi, víst á, at dagatalið (og flotin) alla tíðina hevur verið ov høgt. Umráðandi í eini dagaskipan er, at dagatalið er ásett so, at ikki ov ógvislig sveiggj henda í veiðutrýstinum ár undan ári. Hetta 11-ára skeiðið hevur víst okkum, at veiðutrýstið okkurt árið hevur verið nærum dupult so stórt sum ætlað. Nakað av hesum stavar frá serligum umstøðum í náttúruni, sum greitt er frá niðanfyri. Menningin í m.a. tøkni ger, at skipini so líðandi verða alt effektivari. Hesum má fylgjast væl við í og leggjast upp fyri so ella so.

Veiðutrýstið verður eisini ávirkað av umstøðunum í havumhvørvinum (sí Skjal 2 og Skjal 3). Serliga eru tað veiðuevnini hjá línu, ið verða ávirkað. Í árum við góðum gróðri er nógv føði hjá fiskinum, hann veksur skjótt, og hann tekur ikki so lætt línuna. Er gróðurin hinvegin lítil, er minni til av føði, fiskurin veksur ikki so væl, og hann tekur nógv betri línuna. Av tí, at skipanin við stongdum leiðum er gjørd, so at tað mesta av toskinum og hýsuni verður veitt við húki, so er veiðutrýstið á tosk og hýsu tengt at gróðrinum, og harvið skiftandi, hóast dagatalið er hitt sama. Gróðurin síðan 2002 hevur verið minni enn, og um miðal, og veiðutrýstið á tosk hesi árini var sera høgt. Ábendingar eru um, at gróðurin í 2008 kann gerast miðal ella nakað meira. Tískil kann væntast, at veiðutrýstið næsta ár "náttúrliga" kanska ikki verður so stórt sum nú, men tað tekur tó nøkur ár, áðrenn toskastovnurin kann væntast at vera komin fyri seg aftur.

**ad a-c)** Best hevði verið at banna allari veiðu eftir toski og hýsu, men tað vildi elvt til, at næstan allur flotin varð lagdur. Framskrivingar vísa tó, at tilmældu niðurskurðirnir í dagatali og aðrar tilmæltar reguleringar vilja fáa toskastovnin at vaksa spakuliga aftur. Ikki er neyðugt at skerja allar skipabólkar líka nógv. Bólkarnir 3, 4 og 5 fiska tað mesta av toskinum og hýsuni, og tí mugu teir skerjast mest. Bólkur 2 fiskar bert tosk og hýsu sum hjáveiðu, og av tí at upsastovnurin er hampuliga væl fyri, nýtist skerjingin í dagatali ikki at vera so stór; hendan skerjingin vil ávirka hjáveiðuna av

toski og hýsu nakað. Aðrir skipabólkar eru ikki inni í dagaskipanini, men eingin av teimum eigur at hava eina serliga toska- og hýsukvotu.

**ad d)** Toskastovnurin á Føroyabanka er á sama støði sum seinast í 1980-árunum og fyrst í 1990-árunum. Tá varð Bankin friðaður, og tað tók bert fá ár at fáa toskastovnin at koma fyri seg aftur.

**ad e)** Í gýtingartíðini stendur fiskurin sera tættur, og tí verður hann eyka útsettur fyri veiðutrýstinum.

**ad f)** Toskur (og upsi) veksur upp inni við land, og tað er sera umráðandi fyri at fáa stovnin at vaksa aftur, at ungfiskurin fær so nógvan frið sum gjørligt, so at hann sleppur at seta til tann vaksna stovnin. Tá toskur leitar frá landi og útá, so heldur hann í stóran mun til á leiðunum á skjal 1.

**ad g)** Ein stórur partur av toskaveiðuni hjá teimum smærru lemmatrolarunum verður veiddur her.

**ad h)** Hetta er fyri at sleppa sum mest undan hjáveiðu av toski, men samstundis loyva veiðu eftir tungu, reyðsprøku og havtasku.

**ad i)** Hetta er fyri at minka um veiðutrýstið á tosk/hýsu frá fólki, sum liva av eini aðrari inntøku enn fiskiskapi við Føroyar. Í hesum sambandi verður neyðugt at gera eitt nýtt mark fyri, hvør bátur er vinnuligur og ikki, tí verandi mark er ov lágt sett.

**Viðmerkingar**

Afturlítandi á árini, stovnsmetingar hava verið undir Føroyum (síðan 1961), hevur miðalveiðan av toski á Landgrunninum, toski á Føroyabanka og hýsu og upsa undir Føroyum verið ávikavist 24 tús., 2 tús., 17 tús. og 36 tús tons. Tað er einki, ið bendir á, at tað kunnu fiskast fleiri tons við fleiri troldøgum, fleiri snelludøgum ella fleiri línudøgum ella við meiri línu (fleiri húkum). Heldur er tað so, at í hvussu so er sama tonsatal kann verða veitt við væl minni roynd.

Tað at minka veiðutrýstið er ikki tað sama, sum at veiðan fer at minka. Um veiðutrýstið verður minkað, kemur tað at merkja veiðuna ta fyrstu tíðina (1-3 ár). Eftir tað kann væntast, at veiðan í tonsum sum heild verður tann sama, men at færri og størri fiskar verða veiddir. Og tað hevur nógvar fyrimunir. Teir eru betur egnaðir í gýtingarstovninum, og teir eru betri egnaðir bæði í framleiðsluni og viðvíkjandi fiskaprísi, so at meira fæst burturúr enn við einum ov stórum veiðutrýsti. Eisini kann væntast, at sveiggini í veiðuni ár undan ári verða minni.

Tilgongd av ungum fiski er ymisk ár um annað. Summi ár er tilgongdin góð, onnur ár verri. Við harðari roynd verður fiskiskapurin góður, tey árini tilgongdin er góð. Men samstundis verður lítið og einki eftir til árini, tá tilgongdin ikki er so góð, og heldur ikki verða vakstrarevnini hjá fiskinum nýtt til fulnar. Úrslitið verður samanum tikið, at minni kemur uppá land, og sveiggini millum góð og ring ár verða alt ov ógvuslig.

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY

**Tilfar**

Hetta tilmælið er grundað á:

1) Report of the North-Western Working Group 2008 (Draft). ICES C.M. 2008/ACOM:03: Grundarlagið fyri ráðgevingini hjá bæði ICES og Fiskirannsóknarstovuni, m.a. ein lýsing av umhvørvi og fiskiskapi, hagtøl fyri veiðu og roynd, tilfar frá vísindaligum kanningum og stovnsmetingin av einstøku stovnunum (á enskum) (sí **www.ices.dk**). Hjálagt sum skjal 2.

2) The Faroe Plateau Ecosystem. ICES 2008: Ráðgevingin hjá ICES, har eisini ein samandráttur av støðuni í stovnunum og ein lýsing av umhvørvi, fiskiskapi og regulering av fiskiskapi undir Føroyum er (á enskum) (sí www.ices.dk). Hjálagt sum skjal 3.

3) Samandráttur av ICES ráðgevingini 2008 fyri tosk, hýsu og upsa undir Føroyum. Heimasíðan hjá Fiskirannsóknarstovuni (www.frs.fo). Hjálagt sum skjal 4.

Fiskirannsóknarstovan, 15-06-08

Hjalti í Jákupsstovu, stjóri

PO-Box 3051 · Nóatún 1 · FO-110 Tórshavn · Føroyar
Tlf: (+298) 35 39 00 · Fax: (+298) 35 39 01 · E-mail: fishlab@frs.fo · www.frs.fo